Tap fyri Danmark men sigur á Ukraina

Føroyska mansliðið tapti grannauppgerðina fyri dønum, men móti Ukraina gjørdist talan um sigur og eitt pláss upp í røðini. Kvinnurnar eru nú lidnar at spæla

BRIGDE
Svend Novrup skrivar

Mánakvøldið spældi føroyska liðið í opnu røðini javnleik, 15-15, móti Liktinstein. Tað var kanska eitt lítið vónbrot, men samstundis eitt úrslit av at mótstøðuliðið einamest spældi hazard heldur enn bridge. Teir bæði bluffaðu og undirmeldaðu, soleiðis at talan í stóran mun gjørdist um gitingar, og tí var tað ein herskin biti fyri føroyska liðið, at lítla tjóðin fekk javnleik burturúr.

Veddaði og tapti

Týsdagin kom so siðbundni stórdysturin móti dønum, har mótstøðumenninir hesa ferð tóku dystin í eins stórum álvara, sum føroyingarnir gjørdu tað. Bogi Simonsen hevði undan dystinum vedda við danska liðskiparan um, hvør skuldi vinna dystin, og hetta kostaði Boga eina fløsku av góðum cognac, tí danir vunnu 23-7. Talan var tó um ein góðan dyst, tó at danir kanska vóru í so hepnir, men tað skal tó leggjast afturat, at teir eisini spældu sera væl.

Føroyska liðið fór tó ikki niður við høvdinum av hesi orsøk. Eftir fleiri góðar dystir og nógv óvæntað stig hevur liðið vunnið stóra virðing, og í 26. umfarinum gjørdist talan um 21-9 á Ukraina. Hetta viðførdi, at Føroyar fluttu upp á 33. pláss, men tá næsta mótstøðuliðið er Svøríki, verður torført at verja hesa støðu. Í dystinum móti Ukraina vóru tað Arnbjørn-Hans Jacob og Heðin-Jóannes, sum spældu. Bogi og Rói hildu hesa ferð fri, eftir at teir annars spældu ein góðan dyst móti dønum.

Í samlaðu støðuni er Italia á odda við 565 stigum. Noreg hevur 486 og Bulgaria – sum mátti lúta fyri Føroyum – hevur 479 stig. Føroyar, sum altso eru á 33. plássi, hava 316 stig, og eru næstu londini Belgia og Jugoslavia við ávíkavist 331 og 307 stigum.

Kvinnuarnar lidnar

Føroysku kvinnurnar hava alla tíðina hildið høvdið høgt, hóast tær hava tapt flestu dystirnar. Púra óvæntað vóru tær sera nær við, tá Noreg var mótstøðuliðið. Eftir 17 av 20 spølum var støðan 57-56 til Noreg, men tíverri taptu tær seinastu trý spølini 0-17, soleiðis at samlaða úrslitið gjørdist 11-19 í dystarstigum.

Týsdagin taptu tær 6-24 fyri Ísrael og 7-23 fyri San Marino, so samanlagt endaði liðið á aftasta plássinum, men hinvegin vóru vónirnar um eitt pláss frammarliga í røðini heldur ikki tær stóru. Liðið fekk lagaligar treytir, og slapp tí við EM, og tær seks á liðnum hava avgjørt eina rúgvu av royndum við í viðførinum, tá tær koma heimaftur. Royndir, sum helst kunnu nýtast, tá tær fara at kappast um NM í Havn komandi ár.

Spælið

Vit enda frásøgnina hesa ferð við einum spennandi spælið frá dystinum millum Danmark og Føroyar

KDB106
10874
K103
9

E2 9542
D965 E32
9852 D
DB2
E8764

87
KB
EB764
K1053

Hjá báðum borðunum var kontraktin 3ut í Suður, og í báðum førum spældi Vestur hjartara út til Hj.E hjá Eystri. Hjá Føroyum helt Hans-Jacob á við Hjartara, meðan Mathias Bruun hjá Danmark snildisliga skifti til kleyvara. Rói kavaði til Kl B, og tá fór Lars Blakset aftur til hjartara, soleiðis at mótspælararnir høvdu fimm stikk, tá teir spældu seg inn á Sp.E. Rói iðraði eftir hetta, tí hóast vakra skiftið, so hevði hann vunnið sína kontrakt, um hann stakk við Kl K, men tað er tó ikki lætt at síggja við stongdum kortum.

Her hava vit hinvegin eitt sera vakurt føroyskt spæl, sum sum eftir trý spøl legði Føroyar á odda.

S. E-V
943
-
8762
KD8754

EK76 D8
B987642 D53
5 EDB1094
10 B6

B1052
EK10
K3
E932

Blakset	Bogi	Bruun	Roi
V	N	E	S
			1ut
3Hj	5Kl	pas	pas
pas			

Mathias Bruun spældi skiljandi út við Hj 3. Bogi slapp sær av við tveir spaðarar, fann Ru E á rætta staðnum og hevði 11 stik. Á hinum borðinum spældi N-S við smáum 1 útspæli, so Suður opnaði við 1 kl. Yvir 3 Hj. frá Arnbjørn leyp Norður til 5 kl., men her mátti kontraktin lækkast við trimum eftir Sp E, Sp K og spar til trumf og eftirfylgjandi Ru E og rútara til trumf. 11 IMP til Føroyar.

Føroyski liðskiparin, Bogi Simonsen, tapti veddingina við danska liðskiparin, og hetta kostaði honum eina fløsku av góðum cognac

Sigur í seinna dystinum

Føroyska hondbóltslandsliðið vann seinna dystin móti íslendska U-21 liðnum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir tepurt tap sunnudagin skuldi føroyska manslandsliðið í hondbólti aftur royna seg móti íslendska U-21 liðnum týsdagin.

Og hesa ferð gekst betri. Endaliga úrslitið gjørdist 28-26 til føroyska liðið, sum hesa ferð var nakað styrkt, tí Hans Áki Dal-Christiansen aftur var tøkur.

Ansaðu betri eftir

Um sjálvan dystin hildu venjararnir hjá føroysku monnunum, at leikliga var hann kanska ikki á hædd við fyrru uppgerðina, men taktiskt stóðu okkara seg nú betri.

- Vit vóru í størri mun greiðir um, hvørjum vit skuldu ansa eftir á íslendska liðnum, og tað gjørdi í hvussu so er, at skjúttarnir hjá teimum ikki sluppu eins væl framat, heldur hjálparvenjarin hjá føroyingunum, Hjalmar Klein Olsen.

Føroysku málini í hesum dystinum skutu Sámal Joensen, 9, Heini Joensen, 8, Ingi Olsen 5, Martin Hummeland, 3, John Zachariasen, 2 og Bjarni Wardum 1

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 08/99 til søluvirði.
Tlf. 448033 ella 223811

MITSUBISHI GALANT 2.0
GLS, aut. gear, árg. 88, nýsýnaður, til søluvirði fyri 15.000 kr.
Tlf. 213340

OPEL ASTRA
turbo diesel 1,7, árg. 96, 155.000 km, til søluvirði nóg høgt boð fæst.
Tlf. 319036 - 223717

MAZDA 323 F 1.8
til søluvirði. 5 h., el-rútar, radio, koyrt 12.500 km, árg. 8/96, sera vælviðfarin.
Tlf. 313569, e. kl. 12

GOTT KEYP
Hvítur Golf við aut. gearum, árg. 89, til søluvirði fyri 12.000 kr. Sær gott út og koyrir væl.
Tlf. 265115 - 316002

TIL SØLUVIRÐI
Brúktur Nissan King Van, árg. 89, til søluvirði fyri 10.000 kr.
Tlf. 320370 - 218896

TOYOTA COROLLA 1,6 XL
Reyður, 2 hurðar, hevur koyrt 147.000 km, árg. 92, í góðum standi.
Tlf. 317474 ella 260225

TIL SØLUVIRÐI
Peugeot 206 1,9 diesel, 5 hurðar, árg. nov./88, koyrt 78.000 km, nýsýnaður.
Tlf. 422226

TIL SØLUVIRÐI
Motorur við gearkassa + startara og dynamo til Camry SV10, 130.000 km, bíliga til søluvirði.
Tlf. 227556

SPORTSFELGUR
Spildurnýggjar sportsfelgur við dekkum. Passa til Peugeot og Citroen. Til søluvirði fyri 5.500. Tað er tað sama, sum bert dekkini kosta.
Tlf. 255363

BILUR TIL SØLUVIRÐI
Ford Escort 1.6, árg. 88, heilt bíliga til søluvirði, møguliga sum eykalutur.
Tlf. 224688

HVÍTUR FORD ESCORT
frá 88, til søluvirði fyri 2.500 kr.
Tlf. 441244

BILUR YNSKIST
til keyps fyri 15.000-20.000 kr.
Tlf. 312264 eftir kl. 17

TIL SØLUVIRÐI
Tvey summardekk, 185-65-14, tvey pikadekk, 185-70-14, á felgum, til Mazda 626.
Tlf. 375221

TOYOTA COROLLA 1.6 XL
árg. 89, til søluvirði fyri 16.000 kr. Anlegg og sportsfelgur fylgja við.
Tlf. 260441

BMW 525 TDS
diesel, 143 HK, árg. 93, til søluvirði.
Tlf. 213577

TIL SØLUVIRÐI
Ein Toyota Hilux 2,4, 4x4, árg. 01, koyrt 21.000 km, til søluvirði nóg høgt boð fæst.
Tlf. 444314 - 282722, e. kl. 18

TIL SØLUVIRÐI
Mazda 323 í góðum standi til søluvirði fyri 8.000 kr.
Tlf. 321591 ella 252711

YNSKIST
Hurðar til Ford Fiesta, árg. 88, ynskjast bíliga til keyps.
Tlf. 361145 / 210407

MAZDA 323
árg. 86, bíliga til søluvirði. Krevur ábøtur.
Tlf. 211573

TOYOTA CAMRY 1.8 TIL SØLUVIRÐI
árg. 87, sýnaður 2002. Prísuppskot 11.000 kr.
Tlf. 421211

SUBARU LEONE
árg. 87, til søluvirði. Bilurin er sýnaður 18. juni 02.
Tlf. 321310

TIL SØLUVIRÐI
Billykt framman vinstra, komplett Mercedes 190E. Prísur: 500 kr.
Tlf. 423101

OPEL ASCONA 1.6D
árg. 87, sýnaður 5/2002, í góðum standi til søluvirði.
Tlf. 448075

MAZDA 323 GTI
Tveir Mazda 323 GTI, báðir bilarnir eru frá 86.
Tlf. 447827 ella 224986

TIL SØLUVIRÐI
Nýggjur »safari style« tak bagaguberari til Mitsubishi Shogun (longra modelliið), ella liknandi 4x4 akfør. Ring til Hetlands,
tlf. 01950477341

PEUGEOT YNSKIST
Selur tú tín Peugeot 306 stationcar? Gongur hann við bensini og er hann hægst 3 ár? Vit bíða eftir at tú ringir á
tlf. 319599

TIL SØLUVIRÐI
Motorur við gearkassa + startari og dynamo til Camry SV10, 130.000 km, bíliga til søluvirði.
Tlf. 227556

CHARADE TIL SØLUVIRÐI
árg. 89, til søluvirði um hóskandi boð fæst.
Tlf. 226773

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
23 ára gamal maður søkir arbeiði í summarfrítíðini. Helst í Havn.
Tlf. 253468

ARBEIÐI SØKIST
16 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð og í summarfrítíðini. Alt hevur áhuga.
Tlf. 310634, e. kl. 17

Barnaansing

12 ÁRA GOMUL GENTA
ynskir at ansa 1-3 ára gomlum barni nakrar tímar um vikuna í summarfrítíðini, helst í Hoyvík.
Tlf. 314896

VIT LEITA EFTIR
gentu/kvinnu at ansa eftir 7 mðr. gomlum dreingi gerandisdagar frá 1. aug.
Tlf. 318805

Barnaútgerð

TIL SØLUVIRÐI
Myrkabláur Silver Cross barnavognur við madrassu, kurv og regnslag, til søluvirði fyri 1.000 kr.
Tlf. 320288

VOGNUR TIL SØLUVIRÐI
Ein grønur Silver Cross vognur til søluvirði.
Tlf. 319888

KOMBIVOGNUR TIL SØLUVIRÐI
Ein svartur Simo kombivognur, við lufthjólum, til søluvirði. Við vogninum er: lift, madrassa, koyriposi, flugunet, regnslag, barnaselar, luftpumpa og eyka hjól. Vognurin er 15 mánaðir gamal og er bert nýttur til eitt barn. Vognurin hevur regulerbart handtak og er væl viðfarin. Nærri fæst at vita at ringja:
tlf. 321064 ella 220284

TIL SØLUVIRÐI
Bilstólur, Maxi Cosi, 0-10 kg. Skrástólur. Systkinasetur at seta á vogn og Baby Dan kenguruposi.
Tlf. 314797, e. kl. 19

KOYRISTÓLUR
Myrkabláur koyristólur av slagnum Jalsa til søluvirði fyri 300 kr.
Tlf. 317273

BARNASTÓLUR TIL BIL
Ein 2 mðr. gamal stólur, onki brúktur, til søluvirði fyri 1.000 kr. Er av merkinum Britax og góðkendur upp til 13 kg.
Tlf. 222851

TIL SØLUVIRÐI
Ein lítið brúktur bilstólur, 0-18 kg, til søluvirði fyri 500 kr.
Tlf. 320894

Bátaútgerð

ÍSLANDSRULLA
Brúkt Íslandsrulla við slisku til søluvirði.
Tlf. 447616

BÁTAMOTORUR
Volvo Penta MTD 61 306 HK til søluvirði.
Tlf. 447616

BÁTAMOTORUR TIL SØLUVIRÐI
Volvo TMD 30 A, 62 KW við slirigear, árg. 86, við øllum tilhoyri.
Tlf. 217469

SPEEDBÁTUR
Um hóskandi boð fæst, selji eg speedbátin, 16 fót, av merkinum Skipsplast, hevur 4 takt Mercury 50 hk motor. Báturin er í besta standi.
Tlf. 424515

TIL SØLUVIRÐI
8 aluminiums fiskakassar til søluvirði, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 282722, e. kl. 18

TIL SØLUVIRÐI
24 fót Viksund Combi til søluvirði, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 421597

TIL SØLUVIRÐI
Volvo motorur MDT 61 uttan gear og ein Íslandsrulla við slisku.
Tlf. 447616

YNSKIST
Mariner/Mercury 75 hk ynskist biliga til keyps. Evt. defektur.
Tlf. 213536

Bingo

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 29. juni kl. 15.00. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli 4 x 500 kr. og 1 x 1000 kr. Bingola og eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

GOTT BINGO
verður í Eydnuni sunnudagin 30. juni kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Á lutaseðli 2.000 kr. frá Smyril Line. Drigið verður millum spølini.
Sunda Róðrarfelag

BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum 27. juni kl. 19.00. Full pláta 400 kr. Á lutaseðli m.a. 2x500 kr., 1x1.000 kr., full balja við mati. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl. Koyring heim.
Argja Róðrarfelag

TVØROYRAR KLUBBI
Bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórskvøldið 27. juni kl. 19.30.
Nevndin

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygarkvøldið 29. juni kl. 19.00. Á lutaseðli: Lamb í heyst.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mikukvøldið 1. juli kl. 19.00. 15 vinningar á lutaseðli. Høvuðsvinningur Apex flogferðaseðil.
Astma & Allergifelagið

HEIMA-BINGO
hjá Báruni fæst til keyps á posthúsum og í sølubúðum, og tú sært beinanvegin, um tú hevur vunnið. Heimabingo kanst tú spæla hvønn dag, og tú avger nær tú spælir. Má roynast.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

Brævaskifti

BRÆVASAMBAND YNSKIST
I am a Swedish boy who would like to have faroese correspondance. Or penpals if you like. Christoffer Hæger, Högerudsgatan 5, SE-216 18 Limhamn, Sweden

Burturm. /funnið

BURTURMIST Í SMS
Ein Siemens C35i fartelefon burturmist í SMS. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga ring
Tlf. 456231

ER NAKAR,
sum hevur funnið myndirnar, sum eg havi mist týsmorgunin 18. juni, onkustaðni millum miðbýin og Tórgarðsgøtu? So vinarliga ring
tf. 316143, Gunnar

KETTA BURTURBLIVIN
tann 13. juni á Berjabrekku. Hon er brún, svørt og hvít, hevur reytt hálsband, har navn og tlf. stendur í. Vinarliga sig frá, um tú hevur sæð hana, deyða ella livandi.
Tlf. 311432

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig kvinna søknast eftir íbúð í Tórshavn.
Tlf. 319693 eftir kl. 17

HÚS
ella grundstykki í Vági ynskist til keyps.
Tlf. 374091 ella 215464 e. kl. 18

KAMAR Í KBH YNSKIST
Eg byrji lesnað í summar, men havi einki at búgva í. Leiti eftir kollegiikamari til framleigu ella øðrum kamari frá 1. august. Helst á Amager, men alt hevur áhuga.
Tlf. 316625

ÍBÚÐ ELLA LÍTIL HÚS
ynskjast til leigu í Suðurstreymoy fyri max. 4.500 kr. v/ el og hita. Vit fara væl um.
Tlf. 322762

SOS!
frá Gertrud Ørvarodd: Havi fingið bílagt ferðaseðil og fingið loyvi at taka mín lítla hund við upp, tað er ein danskur/svenskur »gárdhund«, men nú er trupulleikin, at familjan hjá mær vil hýsa mær, men ikki hundinum. Er nakað menniskja, sum vil lata okkum sleppa at sova hjá teimum frá 14.7.–28.7.? Eg vóni at hoyra frá onkrum.
Tlf. 74743270 ella 22960354

STÓR ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Mamma við 18 ára gamlari dóttur søkir eftir stórari íbúð ella húsum at leiga frá 1. aug. fyri 5-6.000 kr. um mðr/ v/ ljósi og hita. Um nakar hevur nakað til okkara, vinarliga ring á
tlf. 322258, e. kl. 20

ÍBÚÐ YNSKIST
Par við tveimum børnum ynskir íbúð í Havn. Má hava tvey kømur. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 255913 ella 251316

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Friðarligt par ynskir íbúð ella hús til leigu skjótast til ber í Fuglafirið, Gøtu ella Runavík.
Tlf. 214005, Bassi / 227264 B ertha

ÍBÚÐ SØKIST Í ODENSE
sum skjótast. Tlf. 0045 21493898
Mail: ingvar_eriksson@hot.mail.dk

KAMAR YNSKIST
Vit eru eitt par, sum leitar eftir kamari í Havn. Vit roykja ikki, drekka ikki og eru sera friðarlig.
Tlf. 260742

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Eysturoy skjótast gjørligt.
Tlf. 228665

ØNSKES TIL LEJE
Mindre lagerrum, garage eller lignende í Argir ønskes til leje snarest muligt.
Tlf. 214128

TIL LEIGU Í MALMØ
80 fermetra herskabsíbúð til leigu í Malmø í 6-12 mðr. Íbúðin liggur 15 min. at ganga fra tokstatiónini og 30 min. at koyra vid toki til Kbh. 2 kømur, stova, wc við baðikar, stórur køkur við kombi vaskimaskinu, uppvaskimaskinu, kolí og frystiskáp. Leiga: 6500,- inkl. vatn og hiti. Íbúðin er í góðum standi og innflytingarklár. Um áhugi, vinarliga skriva til:
anjaeyvindsson@hotmail.com

TIL LEIGU
Nýmótans hús miðskeiðis í Havn, 115 fermetrar í tveimum hæddum, verða leigað út frá 1. juli. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 540

ÍBÚÐ Í KBH. Í SUMMAR
Frá byrjan juli til seinast í august. Stova og kamar bæði við altan. Friðarligt umhvørvi centralt á Frederiksberg. 4.000 kr. um mðr. ella 1.500 kr. um vikuna.
Tlf. 219960

BÚGVA SAMAN Í KBH.
Friðarlig genta, ikki roykjari, kann leiga hugnaligt, møblerað kamar við altan. Atgongd til køk og bað. Centralt á Frederiksberg. Uml. 2.500 kr./mðr. v/ øllum.
Tlf. 219960

ÍBÚÐ Í KBH. TIL LEIGU
Miðskeiðis í Kbh. til leigu í tíðarskeiðinum 25. juni til 20. aug. fyri 500 kr./vikuna.
Tlf. 319597 / 219597

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru ein trúboðarahjún við 7 mðr. gomlum barni og okkum tørvar býli í Tórshavn so skjótt sum møguligt. Helst tvey kømur og kostnaðurin má vera rímuligur.
Andreas og Charlotte, tlf. 321299, kl. 9-16

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:

Navn:……..

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki